AGANEVNDIN

KÆRA 13/2010

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: FC Hoyvík kærir TB fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: 2. deild menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 04.09.2010 | Aganevndin móttikið kæru:16. september 2010 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: Ja |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna, Sissal Kj. Kristjansen, ráðleggingarleiðari og Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna.

**1. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's**

FC Hoyvík hevur, tann 6. september 2010, kært TB fyri at nýta ólógligan leikara í dysti í 2. deild hjá monnum millum FC Hoyvík og TB tann 4. september 2010

Í kæruni vísir FC Hoyvík á, at TB hevur nýtt leikararan Fróði Bærentsen í dystinum, hóast hesin leikari ikki er skrásettur hjá TB.

TB er hoyrt í málinum, og hevur tann 8. september 2010 ført fram, at leikarin er føddur á Tvøroyri og hevur síðan fyrstu barnaárini spælt fótbólt bert við TB. TB sigur víðari, at tað er óskiljandi at leikarin ikki stendur skrásettur sum leikari hjá TB, tí hann er bæði spælari og limur í felagnum.

Starvsnevndin hevur ongar viðmerkingar til málið.

**2. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Sambært grein 2, sbr. grein 5 stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

**3. Fakta í málinum**

Tann 4. september 2010 var dystur leiktur millum FC Hoyvík og TB í 2. deild hjá monnum.

Leikararain Fróði Bærentsen leikti sambært dómaraseðlinum í dystinum fyri TB. Sambært leikaraskráseting FSF's er Fróði Bærentsen ikki skrásettur sum leikari hjá TB.

**4. Lógarverkið**

Grein 15 í Kappingarreglum FSF's ásetur treytir fyri, nær ein leikari kann metast sum lógligur leikari og lógliga kann luttaka í lands- og steypakappingini.

**5. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Vantandi skráseting av leikara í leikaraskrá FSF's er brot á grein 15 í Kappingarreglunum fyri fótbólt, eisini tá talan er um lands- og steypakappingardyst í 2. deild menn.

**AGANEVNDIN**

**6. Niðurstøða**

Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikarum verður sektað við, at felagið verður dømt at tapa dystin.
Aganevndin metir, at síggjast kann ikki burtur frá slíkum fordømum.

**7. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður TB 2. deild menn dømt at tapa dystin móti FC Hoyvík tann 4. september 2010 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**8. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**9. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

**Tórshavn 27/9 - 2010**

Ingunn Eiriksdóttir, forkvinna